Kommunufelagið

Til Mentanarnevnd løgtingsins

Dagfesting
16. oktober 2023

Okkara j.nr.
23/012

Málsviðgeri
Eyðun Christiansen

Tygara j.nr.

Viðv.: Uppskot um at taka burtur endurgjald til næmingaflutning

Sambært lm. nr. 26/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan er ætlanin hjá landsstýrinum at strika stuðulin til skúlabarnaflutning, til samans góðar 2,2 mió. kr.

Stuðulin verður latin kommunum, sum hava fyri neyðini at senda næmingar sínar í aðra kommunu at ganga í skúla. Talan er í flestu førum um smáar kommunur, sum ikki hava eitt neyðugt barnagrundarlag til at skipa ein vælvirkandi skúla í nærumhvørvinum.

Sambært viðmerkingunum til uppskotið verður hetta gjørt fyri at javnseta allar kommunur. Kommunufelagið metir ikki, at hetta er nøkur haldgóð grundgeving, heldur tvørtur ímóti.

Endurgjaldið er hinvegin ætlað til at javnstilla kommunur, soleiðis at tær kommunur, sum hava fyri neyðini at senda børn síni í aðrar kommunu at ganga í skúla, ikki skulu bera allar eykaútreiðslurnar, ið standast av hesum.

Ætlanin við uppskotinum er fram um nakað annað at flyta útreiðslurnar frá landskassanum til nakrar útvaldar kommunukassar, sum ofta ikki hava stóra fíggjarliga orku frammanundan.

Kommunufelagið kann ikki taka undir við uppskotinum og mælir landsstýrinum til at finna aðrar neyðugar sparingar fíggjarlógini, heldur enn at áleggja kommununum fleiri útreiðslur.

Vegna
Kommunufelagið

Tórbjørn Jacobsen
formaður

Eyðun Christiansen
stjóri

R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn

Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo